# Verkførari søkist

**Søkt verður eftir verkførara til bilverkstaðið á Frælsinum.**

Meira fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 216364 ella senda ein teldupost til runi@dekk.fo

DEKK SENTRIÐ

KIOSK ACTIV

# Starvsfólk søkist

Søkt verður eftir krambafólkið til at arbeiða náttarvaktir í vikuskiftinum og vanligar kvøldvaktir í Kiosk Activ, J. Broncksgøtu at byrja skjótast gjørligt.

Eisini sóknast vit eftir vaskifólki.

**Nærri fæst at vit við at ringja á tlf. 73 37 41**

Nú fara vit til

# NESVÍKAR!

## Lega fyri øll:

**Familjur, ung og gomul, børn og vaksin, støk og pør....**

Legan verður sett í Nesvík **fríggjakvøldið 3. okt. 2008**

kl 20.00 (koma frá kl. 19.00), og vit fara til húsar aftur sunnudag 5. okt. aftan á kirkjugongd og døgurða.

Á skránni verður ymiskt til gaman og álvara:

***Vónandi verður góð undirtøka!***

Tit skulu hava soviposa ella dýnu við, handklæði, tannbust osfr.

**Kostnaður:**
Vaksin kr. 200,
børn frá 7 til 14 ár kr. 50.

**Tilmelding hjá:**
Jóhonnu 421269 ella 227701
Grækaris 421265 ella 212265
Ara 421466 ella 219075
Rannvá 421280 ella 266133
Hans Jákup 421238
Elin-Mariu 421171 ella 503258

FØROYA LÆRARAFELAG
BÓKADEILDIN

BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS
í samstarvi við
EIK BANKA

skrivar við hesum út

KAPPING
um at skriva

STUTTSØGU TIL UNG

ENDAMÁLIÐ er stór norðurlendsk bókaútgáva við nýggjum stuttsøgum til ung.

Í savninum verða 8 norðurlendsk forløg úr 8 ymiskum máløkjum umboðað við einari ella tveimum stuttsøgum hvørt.

SØGAN skal vera til ung. Hon má í mesta lagi vera 15.000 sløg á knappaborðið. Søgan skal fara fram í okkara samtíð og hava kærleika sum høvuðsevni.

HANDRITINI skulu verða Bókadeild Føroya Lærarafelags í hendi í seinasta lagi fríggjamorgunin 28. november kl. 9.00

Handritini skulu latast inn í afturlatnum brævbjálva, uttan at navn verður tilskilað. Høvundurin skrivar navn og bústað sín í øðrum afturlatnum brævbjálva, ið skal fylgja við handritinum.

VIRÐISLØNIR á 12.000 kr verða latnar einum ella tveimum vinnarum. Eik Banki letur vinningarnar. Bókmentaliga nevnd Føroya Lærarafelags er dómsnevnd og tilskilar sær rætt til onga virðisløn at lata, um ikki verður hildið, at nøkur søga er virðislønarverd.

VIKUSKIFTISSKEIÐ verður ætlandi í Tórshavn 6.-9. februar 2009, har ætlanin er, at allir høvundar, ið verða tiknir við í útgávuna, skulu hittast saman við forleggjarum og fakfólki, har søgurnar verða viðgjørdar og betraðar.

Eitt gott høvi hjá skrivandi fólki at hittast og fáa íblástur og kunning um at skriva.

BÓKIN verður ætlandi givin út á heysti 2009, og hon kemur út í øllum londunum samstundis.

**Bókadeild Føroya Lærarafelags**
Pedda við Stein gøta 9
100 Tórshavn

**Bókadeild Føroya Lærarafelags** er barna- og ungdómsbókaforlag, ið eisini umsitur Bókaklubban, Skúlablaðið og Strok. Heimasíða okkara er: www.bfl.fo

# INNBJÓÐING

Ísambandi við vitjanina frá Dansk Projektledelse v/ Morten Fangel, bjóðar FVL til evnisdag um verkætlanarleiðslu **fríggjadagin 12. september á Hotel Hafnia, Høllini.**

Evnisdagurin er ætlaður bæði almennu umsitingini og vinnulívinum og vendir sær serliga til fólk við ábyrgd fyri verkætlanum, og annars teimum, ið hava áhuga at menna sín førleika innan verkætlanarleiðslu.

**Fyrrapartin kl. 9.00 – 12.00 verður fyrilesturin: "Tendenser i Nordisk Projektledelse"**
við Morten Fangel. Evnini, sum verða viðgjørd eru serliga málrættað tykkum sum eru virkin í stýrisbólkaarbeiði, t.d.

- Uppgáva, manning av stýrisbólkum
- Teir ymisku leiklutirnir í verkætlanarleiðslu
- Samstarvið millum stýrisbólkaformannin og verkætlanarleiðaran
- Tilrættalegging av verkætlanarleiðsluni
- Verkætlanar- og leiðslumyndlar

**Tilmelding** fer fram við at gjalda luttøkugjaldið á konto felagsins, sum er 9181 1484534. Luttøkugjaldið er 300 kr. fyri limir og 500 kr. fyri ikki limir. Íroknað kaffi/te og morgunmatur.

**Seinnapartin kl. 13.00 – 15.00 verður kunning um IPMA sertifiseringina.**
Øll ið hava áhuga fyri certificering ella ætla sær at melda seg til certificering, sum skipað verður fyri í vetur, er vælkomin. Tað er ókeypis at luttaka og tilmelding er ikki neyðug..

**Morten Fangel**
Morten Fangel er stjóri hjá Dansk Projektledelse og hevur staðið á odda fyri menningini av altjóða IPMA sertifiseringini. Morten Fangel hevur granskað, skrivað bøkur, ritstjórnað søvnum og tíðarritum um verkætlanarleiðslu. Umframt holla útbúgving og vitan er Morten Fangel eisini kendur fyri síni heilt serstøku evni at bera fram sína vitan um verkætlanarleiðslu, bæði til toppleiðslur, verkætlanarleiðarar og -starvsfólk – bæði sum ráðgevi, fyrilestrarhaldari og sum undirvísari á skeiðum og vísindaligum ráðstevnum.

**Øll eru vælkomin.**

Føroysk Verkætlanarleiðsla
Partur av Dansk Projektledelse

## Frítíðar / familju bátur til sølu

Riviera 925 - flybridge version, árg ´96.
10,25 m langur, 3,20 breiður, 90 cm dýpd.
Allar hentleikar - so sum kaffimaskina, køliskáp, kókiplátur, oljufýr, wc / brúsa, bóvskrúva, el akker, o.a.
8 sitipláss, 5 sovipláss - 2 kømur
motor: 1 volvo penta, kad300, 285 HK, árg ´06 - siglt 275 tímar
Báturin hevur skaða og kann síggjast eftir avtalu eins og á www.huseklepp.net.
nývirði 1.775.000 kr - marknaðarvirði ístandgjørdur ca. 1.200.000 kr.
**- selist fyri nøktandi boð.**

**Um áhugi, so ring 229654**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Íbúð ynskist

Íbúð ynskist til leigu í Havn frá 1. januar 2009 til eldri mann. Eri friðarligur og fari væl um.

Ring á tlf. 211322

Lesið Sosialin -so eru tit við!